52-115/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar

Uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-115/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Anniku Olsen, løgtingsmanni, um nágreining av viðmerkingunum í kapittul 24 í revsilógini um kynslig brotsverk

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Metir løgmaður, at viðmerkingarnar til kapittul 24 í revsilógini, heruppií § 216, eru nóg greiðar?
2. Um nei, hevur løgmaður ætlanir um at nágreina revsilógina og nær ?
3. Metir løgmaður, at Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni er nóg væl mannað?
4. Kann løgmaður greiða frá arbeiðinum hjá Revsirættarliga ráðnum?

Svar:
Yvirskipað aftri eg meg rættuliga nógv við at svara hesum fyrispurningi. Hann er alment orðaður, men grundarlagið fyri honum er ein heilt ítøkiligur dómsmannadómur á fyrsta rættarstigi hjá Sorinskrivaranum, sum nú er skotin inn fyri landsrættin.

Vit hava í stýrisskipanarlógini § 1 eitt greitt valdsbýti í Føroyum. Lóggávuvaldið er hjá løgtingi, útinnandi valdið er hjá landsstýrinum, og dømandi valdið hjá dómstólunum. Í ikki yvirtiknum málum er valdið hjá tilsvarandi donskum stovnum.

Eftir mínum tykki bera bæði løgting og landsstýrið seg óhøviliga at, um tú gerst viðmerkingar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu ávirka landsrættadómsmannarættin, meðan hann situr.

Við hesum fyrivarni, er svar mítt hetta:

Til 1:
Kapittul 24 í revsilógini varð dagførdur í 2016, og heilt yvirskipað haldi eg, at parturin er nóg greiður. Í allarflestu førum er rættarstøðan tann sama í Føroyum og í Danmark.

Lóggávan er søguliga grundað á royndir og viðurskifti í nógvum málum í Danmark í gjøgnum tíðina. Eisini byggir hon á drúgv álit, sum serfrøðingar hava skrivað um evnið. Revsirættarliga ráðið í Føroyum hevur eisini viðgjørt lóggávuna í mun til føroysk viðurskifti, tá ið lóggávan varð dagførd.

Lóggávan byggir rættiliga greitt á, at lóggávuásetta revsingin liggur innan fyri karmarnar, sum dómstólarnir skulu revsa innanfyri.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

T.d. stendur í § 216 um neyðtøku, at revsast kann við fongsli upp til 8 ár, meðan revsingin gongur upp til 12 ár, um talan er um barn yngri enn 12 ár ella, um neyðtøkan hevur verið av serliga grovum slagi ella, at umstøðurnar á annan hátt hava verið skerpandi.

Tað stendur dómstólinum frítt at áseta revsingina innan fyri hendan karm. Ásetingin verður gjørd við støði í ítøkiligu metingini hjá dómstólinum í hvørjum einstøkum føri. Lesur tú viðmerkingarnar til § 216 kann tað víkjast frá hesum sambært rættarsiðvenju ásetta revsistøðinum bæði við at skerpa og at linka, alt eftir, hvussu grovt brotsverkið er, og um tað í tí ítøkiliga málinum eru skerpandi ella linkandi umstøður.

Við rættargangslógini, sum kom í gildi í Føroyum 1. januar í ár, varð ein skipan við dómsmonnum sett í verk. Ætlanin við hesi skipan er, at vanliga rættarfatanin hjá føroyska fólkinum um ítøkiligt mál eisini skal brúkast innan dómstólarnir - eitt nú hvar støðið fyri revsingina eigur at liggja.

Í Danmark hevur tann ósiður tikið seg upp, at fólkatingið í viðmerkingunum sigur sína hugsan um, hvar revsingin fyri einstøku brotsverkssløgini eigur at liggja. Hendan sið haldi eg ikki, at vit eiga at taka upp í Føroyum. Revsikarmarnir eiga at verða orðaðir í sjálvum lógartekstinum, og síðani er tað upp til dómstólarnar at døma eftir tí.

Landsstýrið arbeiðir i løtuni við at dagføra og føroyska revsilógina. Hetta arbeiðið byrjaði i 2016, og tá ið hetta er eitt umfatandi og tíðarkrevjandi arbeiði, er dagføringin býtt sundur í hóskandi partar. Í løtuni verður arbeitt við at føroyska almenna partin i revsilógini, og ætlanin er at leggja henda partin fyri Løgtingið i tingárinum 2021.

Til 2:
Ætlanin er at fara undir at dagføra revsilógina, tá ið almenni parturin er liðugur. Og sum eg svaraði Ingilín D. Strøm í skrivliga fyrispurninginum SS-009/2020: Samtykkisgrundaða neyðtøkulóggávu, so verður tað í heyst, at farið verður undir at dagføra kapittul 24, kynslig brotsverk, í revsilógini. Tá er eisini ætlanin at gera aðrar neyðugar dagføringar.

Til 3:
Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni kundi verið betur mannað. Tað eru nógv lóggavuøkið, sum bíða eftir at verða dagførd, tí at orka ikki er til tess. Men ikki spyrjaranum at siga, so er tað ein spurningur um játtan. Annaðhvørt ein spurningur um at hækka samlaðu játtanina á Løgmansskrivstovuni ella at umraðfesta verandi innanhýsis játtanina.

Til 4:
Tá ið revsirætturin kom á føroyskar hendur 1. mars 2010, varð mett, at tørvur var á einum revsirættarligum ráði, sum kundi ráðgeva landsstýrismanninum í lógarmálum.

Revsirættarliga ráðið var sett 1. apríl 2011. Limirnir í ráðnum eru umboð fyri fakbólkar, sum hava við revsirætt at gera. Tey umboða dómsvaldið, fútan, Kriminalforsorgina, Advokatfelag Føroya, Fróðskaparsetrið og Lógartænastuna á Løgmansskrivstovnuna.

Revsirættarliga ráðið hava havt fund hvørja ferð, ætlanin hevur verið at dagføra og broyta revsilóggávuna. Uppskot til broytingar hava verið sendar pørtunum, og síðan lagdar fyri og umrøddar í Revsirættarliga ráðnum. Síðani hava einstøku partarnar eisini fingið uppskotið til ummælis.

Hvørja ferð ein partur av revsilógini varð liðugt dagfærdur og føroyskaður, hevur eisini verið skipað fyri ummælisfundum við avvarðandi partarnar í mun til einstaka uppskotið. Øll uppskot hava eisini verið send breitt út til ummælis.

Í sambandi við at dagføra kapittul 24, Kynslig Brotsverk, vóru hesir partar á ummælisfundi: Amnesty International, MEGD, Føroyskir sálarfrøðingar, Føroya advokatfelag, KRIS og Stalking bólkurin.

Harafturat varð uppskotið sent hesum pørtum til ummælis: Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Kriminalforsorgini, Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum, Heilsu-og innlendismálaráðnum, Kommunufelagnum, Barnaverndarstovu Føroya, Barnaumboðnum, Fróskaparsetur Føroya, Almannaverkinum, Gigni, MEGD, Javna, Advokatfelag Føroya, Føroyskum Sálarfrøðingum, Sosialráðgevarafelagnum, Føroya Lærarafelag, Føroya Pædagogfelag, Føroya Politistafelag, Sig Frá, Amnesty International, KRIS, Stalking Bólkinum, Barnabata og Kvinnuhúsinum

Í Tinganesi, 23. apríl 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður